## Samandráttur frá fundinum *'Ein ferðavinna ið ikki órógvar'*

Sandoyar Kunningarstova og Fróðskaparsetrið eru fegin um góða uppmøting og ein áhugaverdan fund á Hotel Skálavík, 5. juli 2018.

**Samandráttur**
Fundurin millum hagarnar og Kunningarstovuna var mest kunnandi og við tí endamáli at skifta orð um hvussu ferðavinnan skal skipast. Fundurin gav Kunningarstovuni gott innlit í hvat hagarnir ynskja, og ikki, og gav okkum nakað at arbeiða víðari við.

Tit nevndnu m.a. hesar avbjóðingar:

- Fólk spyrja ikki um loyvi at ganga, og kunnu forstýra tá tey ganga í haganum, til dømis í samband við rakstur og lembing, og tey kunnu órógva hagafugl.
- Hundar eru ein trupuleiki, serliga í lembing.
- Ferðsla fram við eggini má skipast betur, so fuglur og seyður fær frið.
- Onkrastaðni er vandamikið at ganga. Marknaðarføringin hjá VisitFaroeIslands vísir ikki hetta.
- Um bygdagøturnar var spurt inn til, um tær veruliga eru hvørsmansrættur, har øll hava fría atgongd. Hagin er eitt arbeiðspláss. Skulu ferðafólkini hava rætt at órógva og ganga júst sum tey vilja?

Vit tosaðu eisini um loysnir. Har tosaðu vit m.a. um:

- Tað er gott við samskipan um loyvi at ganga í haga. Tað má vera lættari hjá ferðandi at vita hvønn tey skulu spyrja. Heldur eitt nummar enn 100 nummør at ringja til.
- Atgongd í hagan má avmarkast, og summi øki skulu verjast.
- Bara tí pengar vera kravdir fyri gongutúrar merkir tað ikki at har er náttúruvernd. Har skal meir gerast. Skeltaverkætlanin hjá VisitFaroeIslands kann hjálpa við at kunna.
- Vit vilja helst hava staðkendar ferðaleiðarar. Ein loysn er, at hagastýrið góðkennir ferðaleiðarir í sínum øki, og at fleiri hagamenn/kvinnur eisini eru ferðaleiðarir.
- Vit kunnu eisini senda fólk fleiri ymsa staðni, so øll ikki slíta sama øki.

Hagarnir eru ymiskir, avbjóðingarnar ymiskar og summi øki eru meir árend av ferðafólki enn onnur. Summa staðni má ferðaleiðari vera við, fyri bæði trygd og burðardygd. Vit skiltu á lagnum, at har eru trý 'sløg' av ferðaleiðum. Fróðskaparsetrið hevur, við fyrivarni, teknað tað inn á kortið, ið tey hildu komið var fram til (sí viðheft kort):

1) Bygdagøtur (her sigast fólk at hava rætt at ganga, men tað er ikki ráðiligt í øllum førum)
2) Gøtur har fólk kunnu ganga uttan ferðaleiðara
3) Gøtur/gongutúrar, sum krevja ferðaleiðara

**Hvat kunnu vit gera her og nú?**
Tit mugu fegin seta tykkum í samband við kunningarstovuna um at seta skeltir og/ella pelar upp, so vit saman kunnu vegleiða øllum ferðandi at fara har vit vilja hava tey at fara.

**Hvussu fær hagin nakað burturúr?**
Vit vilja fegin, í samstarvi við tykkum bjóða túrar í høgunum. Tit avgera hvørjar túrar tit vilja bjóða í tykkara øki, og um tit vilja bjóða nakran túr í 2019. Tit avgera um pengarnir skulu fara beinleiðis til hagarnar ella um vit t.d. gera eina pulju til neyðugt viðlíkahald, í samband við ferðavinnu.

Best er um vit sum skjótast fáa nakrar fastlagdar túrar við ferðaleiðara, ið vit kunnu bjóða til summarið 2019. So kann kunningarstovan byrja at kunna um hesar túrar í góðari tíð (tað er 9-12 mðr. áðrenn tilboðið verður boðið út). Til hesar túrar kann kunningarstovan gera ein faldara, har upplýsingar eru um longd á túri, hvussu strævin túrurin er, bílegging og prís.

**Skelting**
Umvegis Kunningarstovuna ber tað til at gera kunnandi skeltir í 2018. Hetta er ein partur av skeltaverkætlanini VisitFaroeIslands. Hesi skelti kunnu setast upp millum annað har ið ferðafólk skulu vera sera ansin, har tey eru til ampa ella har tey skulu kenna til reglur í økinum. Skeltingin fíggjast av VisitFaroeIslands, og uppseting og viðlíkahald fíggjast av antin haga ella kommunu. Nevnt var á fundinum, at tað kanska var ein loysn um kommunur fíggja størri skeltir á sjónligum støðum, meðan hagar fíggja smærri skelti í høgunum. Hettar er bert eitt uppskot.

Vegna Sandoyar Kunningarstovu
tann 6. august 2018

Simonsen

Tordis Kristina á Rógvi Simonsen